# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Diamantbrúdleyp í Lopra

# Signhild og Poul Midjord



Tann 24. juli 2008 hava Signhild og Poul Midjord í Lopra verið gift í seksti ár. Tey giftust tann 24. juli 1948 og fingu saman tvær døtur, Emma Suffía Maud og Irena Nina Dagmar. Tey hava í dag 6 ommu- og abbabørn og 6 langommu- og langabbabørn.

Signhild er ættað úr Lopra og Poul av Økrum.

Foreldrini hjá Signhild vóru Dagmar, fødd Kjærbæk, og Niels Bech í Lopra. Dagmar var úr Sumba og Niels, vanliga nevndur Niels á Ongini, var úr Lopra. Signhild er 3. seinast í einum systkinaflokki uppá 8, hesi eru Óli, Jensia, Martin, Niklas, Emma, Signhild, William og Eivind. Av systkinaflokkinum eru 5 í dag á livi. Martin og Emma máttu lúta fyri tuberklunum, tá tey vóru í 20' unum, og Óli andaðist sum 67 ára gamal.

Foreldrini hjá Poul vóru Anna Suffía, fødd Kjærbo, og Niels Petur Midjord av Økrum. Niels Petur, vanliga nevndur Stóri Petur, er føddur á Økrum, meðan Anna Suffía var úr Sumba.

Systkini vóru 9 í tali, Søren Pauli, Ferry, Niels Petur (Pedan), Føroy, Hans Jacob, Erna, Ferry, Poul, Rudolf og Arthur. Av hesum eru í dag Hans Jacob, Poul og Rudolf eftir á lívi. Ferry andaðist sum smágenta, meðan hini eru farin, eftir at tey eru vorðin tilkomin.

Hjúnini hava búð í Lopra síðan 1948. Signhild starvaðist eitt skifti á spinnarínum í Havn, síðani í handlinum hjá Poul Bech í Lopra og hevur arbeitt á Polarfrost í 26 ár. Poul fór til skips sum 17 ára gamal og arbeiddi frá 1947-1952 á Hvalastøðini í Lopra. Í 60'unum arbeiddu hjúnini eitt skifti fisk í Íslandi. Poul keypti í 1968 bátin "Torri" saman við øðrum, og fiskaðu teir við línu og snellu undir Føroyum og Íslandi. Fyrst í 80'unum fór Poul, saman við øðrum, undir fiskaaling á Lopransfjørði, og bygdu teir eisini Sláturvirkið í Ónavík.

Dagurin verður hildin hjá Ingunn og Heina í Havn saman við familjuni.

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Karl Olavus Dam**, úr Sumba, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi sunnudagin 20. juli, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju hósdagin klokkan 13:00. Tey, ið vilja minnast Lavus, kunnu lata Missiónshúsinum í Sumba eina peningagávu, konto í pengastovnunum.

**Tommy Vinther Kjærbo**, ættaður úr Vági, búsitandi í Esbjerg, andaðist hósdagin 17. juli, 46 ára gamal. Bønarhald verður í Jerne kirkju í Esbjerg hósdagin 24. juli kl. 12.30. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum í Havn sunnudagin kl. 14.00.

## Dagurin

**24. juli. Kristin**. Eftir halgisøguni er talan um eina ellivu ára gamla gentu, sum verður tikin av døgum, av tí at hon breyt nakrar skurðgudamyndir og gav teimum fátæku gullið og tað dýra tilfarið, tær vóru gjørdar av. Annars hava tvær halgar kvinnur 24. juli sum minningardag, Sankta Kristina úr Týrus og Sankta Kristina úr Bolsena.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Emma Hentze**
Øravíkarlíð

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkini á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri góða røkt og umsorgan.
Tøkk til Símun Jacobsen, prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til Rebekku Mortensen fyri yndisliga sang hennara í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, gravara og tykkum, ið á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk, øll tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Hjartans tøkk øll somul.

**Børnini**

## Grønlandstíðindi frá Kára við Stein:

# Kappin fær nógvan tosk

**Kári greiðir sum vanligt frá dag fyri dag**



**10. juli**
Í dag kom Polar Nagtoralik inn til Nuuk at landa, og í Sisimiut kom Polar Amaroq inn at millumlanda.

**11. juli**
Í dag var Polar Qrasiut í Nuuk og landaði. Kappin var her í Sisimiut og millumlandaði. Har var alt fult hjá teimum av toski. Sjálvt ein 20 fót bingja, sum er á dekkinum, var full. Regina C landaði í Manitsoq.

**15. juli**
Í gjár var Steffen C í Manitsoq og landaði. Í dag kom Lómur inn eftir kørum. Teir skulla landa í Illulisat. Teir komu úr Nuuk, har teir løgdu 130 tons upp av ísaðum rækjum. Teir skulla landa har einar tveir túrar. Lómur verður sendur alla stadir at landa fyri tíðina

**16. juli**
Í dag er av allar fagrasta veðri við nógvum mýggjabitum, sum eru ógvuliga svangir eftir at smakka sær á av blóði. Kappin kom inn at landa í morgun. Teir hava knapt 400 tons inni, og Polar Amaroq er inni í Nuuk og landar.

**17. juli**
Í dag er sama veðrið sum í gjár. Tað er ein øgiligur hiti og nógv av mýggjabitum sum leingjast eftir blóði. Regina C kom inn at skifta yvirmenn í morgun. Teir hava rokast har umborð. Teir hava fiskað gott 2000 tons í hesi perioduna, og tað er fyri 28 mill kr. Teir fóru út úr Manitsok og hava 326 tons, síðani teir komu út aftur Ófórt fiskarí, sum skilst so er hetta tað mesta, sum teir hava fiskað í eina periodu. Skipari hetta tørnið var Jóan Pauli úr Fuglafirði. Kappin var útlossaður í morgun. Teir sigldu í kvøld kl 1800 inn at leggja seg at taka ímóti fiski. Støddin er so at siga bara smátt, sum teir fáa. Ongin lippu ella kjálkafiskur er í eini støð, sum kann brúkast. Lómur kom til Illulasat í morgun at landa. Teir hava 125 tons inni. Hetta tørnið hevur Lómur gjørt 8 túrar. Onkran túr hava teir ligið í tvey døgn, til teir sluppu út aftur. Síðst í Nuuk lógu teir í fýra døgn fyri at fáa kørini við út aftur. Teir hava fiskað knapt 1000 tons inntil nú.

**18. juli**
Í dag er sama veðrið. Christian Høj, gamli Suðurvarði, kom inn í morgun at landa avhøvdaðan torsk. Teir hava 130 tons inni, sum teir hava tikið ímóti frá jollum uppi við Kangatsiaq. Teir hava ligið har í 20 dagar. Onkrar sjaskdagar hava teir haft, so jollurnar ikki hava kunnað komið og avreitt. Har er uppá sama máta sum við Kappanum, bara smátt.